


# Kringvarp Føroya 2016
## – frágreiðing um virksemið

KRINGVARP FØROYA

# **Kringvarp Føroya 2016**
# – frágreiðing um virksemið

Avrit frá kvf.fo

**6. frágreiðingin um virksemið hjá**
**Kringvarpi Føroya**

## Innihald:

Formæli ... 4

Public Service í tímum ... 5

Álit ... 6

Fíggjarliga nýtslan ... 8

Aktuelt ... 10

Mentan ... 12

KVF raðfestir børn og ung ... 13

Barnasjónvarpið ... 14

Aðrar sendingar á Mentan ... 16

Ítróttur ... 19

Tónleikur ... 21

11. flokkar og bólkar vitjaðu Kringvarpið ... 23

Skyldur hjá Kringvarpi Føroya ... 24

Heimasíðan ... 25

Keypa sendingar og vanligar tænastur ... 27

Førleikamenning og útbúgving ... 28

Bygnaðurin ... 29

Roknskapur ... 30

Avrit frá kvf.fo

# Hendingaríkt ár

Árið 2016 var enn eitt hendingaríkt ár í Kringvarpi Føroya. Eitt ár, har stórar fyrisitingarligar broytingar vóru, men eisini eitt ár, har virðismiklar sendingar vórðu gjørdar. Eitt nú fer sendirøðin O, Móðurmál heilt vist at standa sum ein varði til eftirtíðina.

2016 var eisini árið, tá SavnsGull fekk stuðul frá grunninum hjá A. P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møller til almenn endamál. Í november játtaði grunnurin fimm milliónir krónur til at talgilda sjónvarpspartin, so nú verður alt savnsgullið bjargað.

November var eisini mánaðin, tá Kringvarp Føroya spílaði seg út, tí kommunuval var á skránni. Valdagar eru serligir í Kringvarpi Føroya, tí øll okkara starvsfólk kýta seg við at avgreiða henda spennandi dag, sum hevur stóran týdning fyri fólkaræðið.

Nógv varð kunnað á miðlapallum kringvarpsins seinastu vikurnar undan kommunuvalinum 8. november, har 29 einstøk kommunuval vórðu avgreidd. Tá valstøðini lótu aftur, samlaði Kringvarp Føroya øll úrslitini og miðlaði tey í útvarpi, sjónvarpi og á heimasíðuni – ein tænasta, Kringvarp Føroya við gleði veitir føroyingum nær og fjar.

Fleiri áhugaverdar sendingar vórðu eisini gjørdar í fjør. Eitt nú tvær sendingar við heitinum “Stríðið um tey 10 prosentini”, um royndina hjá samgonguni at broyta fiskivinnuna. Fyrra sendingin um sonevnda Skattamálið, har Eik Banki og Taks vóru ósamd um skattafrádráttin, varð eisini send. Og 14. september var sendingin “Her er dagur og dimmið er av” – 70 ár síðani fólkaatkvøðuna um samband og loysing í 1946 – á skránni.

Kringvarp Føroya rakti eisini seymin á høvdið við sendirøðini Koba & Vatnhamar, sum beinanvegin fekk stóran fjepparaskara kring landið. Undirhaldssendingin varð væl móttikin, og verða eisini fleiri partar gjørdir í røðini.

Eg kundi nevnt nógv aftrat, sum dugnaligu starvsfólkini á stovninum hava ríkað okkara lurtarar, lesarar og hyggjarar við á okkara miðlapallum. Men henda frágreiðing er ein samandráttur av virkseminum í 2016, so tað er bara at lesa víðari.

Á fyrisitingarliga økinum var ein serlig broyting í fjør, sum hevur havt stóran týdning fyri Kringvarp Føroya. Innkrevjingin av kringvarpsgjaldinum varð grundleggjandi broytt og løgd til TAKS at umsita. Broytingin hevði við sær, at gjaldsskyldan, sum áður var tengd at húskjum, nú er tengd at persónum.

Arbeiðið at út- og umbyggja Kringvarpshúsini í Sortudíki er at kalla liðugt. Kringvarp Føroya hevur fingið ein framleiðslubygning, eina umsitingarlon og eina forhøll. Hølini verða tikin í nýtslu, tá ið tøkniligar innlegginar, útgerð og innbúgv er fingið til vega. Uppgávan verður nú at fylla karmarnar við virksemi, sum kemur øllum føroya fólki til góðar.

Somuleiðis verður uppgávan at laga virksemið hjá stovninum til nýggja public service sáttmálan, sum er galdandi næstu fýra árini til 31. desember 2020.

Tað týdningarmesta fyri almenna miðlastovnin er, at stovnurin hevur eitt gott orð á sær; at føroyingar eru góðir við Kringvarp Føroya, brúka miðilin og hava álit á miðlinum.

Skal Kringvarp Føroya hava týdning fyri føroyingar, er umráðandi, at stovnurin áhaldandi tillagar seg í mun til samfelagið, og ikki minst endurnýggjar seg í mun til miðlaheimin, sum støðugt mennist og broytist.

Stovnurin má veita nøktandi miðlatænastur, og tey 85 starvsfólkini mugu stremba eftir, at brúkarin fær góðskutilfar á øllum miðlapallum, sum er álítandi og fakliga væl grundfest.

Góðan lesna!

*í Sortudíki, juni 2017*

**Dia Midjord, stjóri í Kringvarpi Føroya**

Avrit frá kvf.fo

# Public service tímar

| Public Service, uppgjørt í tímum | | | |
|---|---|---|---|
| **Bólkingar** | **Útvarp** | **Sjónvarp** | **Tilsamans** |
| Aktuelt | 461 | 174 | 635 |
| Mentan | 455 | 79 | 534 |
| Átrúnaður | 178 | 69 | 247 |
| Ítróttur | 137 | 245 | 382 |
| Børn og Ung | 103 | 156 | 259 |
| Infotainment | 816 | 43 | 859 |
| Tónleikur | 3.133 | 22 | 3.155 |
| **Samanlagt** | **5.283** | **788** | **6.071** |







***Bólkarnir fevna um hesar sendingar:***

**Tíðindi:** Útvarpstíðindi, Dagur og Vika, D&V-kjak, Radarin og mánakvøld dokumentarsendingar

**Tónleikur:** Tónleikasendingar í útvarpi og sjónnvarpi, konsertir, FMA og Náttarrásin

**Infotainment:** Heitið fyri sendingar, sum fella undir “information” og “entertainment”: Morgunsendingin, Vikuskiftið, Surk, Also, summargestir, ólavsøkuprát o.tl.

**Børn og ung:** Barnaútvarpið og barnasendingarnar í sjónvarpinum, føroyskar og týddar

**Átrúnaður:** Morgunlestrar, andaktir, guðstænstur, møti, Credo og stakar sendingar

**Mentan:** Mentanarsendingar sum Mentanarcaféin, Grindin, Breddin, siðsøga (Meg minnist), frásagnir (Við Tórða á túri), dokumentarsendingar, hóskvøld náttúrusendingar, framhaldssøgur, stuttsøgur, útvarpsleikir, ummæli og sendingar um høgtíðir o.tl.

**Ítróttur:** Ítróttarsendingar í útvarpinum, 3-2 í sjónvarpinum, frásagnir frá ítróttardystum og teimum stóru finalunum, landsdystum og tá føroyingar hava kappast í størri og altjóða kappingum.

Avrit frá kvf.fo




# Álit

## Álitisbarometrið

Tað skerst ikki burtur, at álit er ein av fortreytunum fyri tilverugrundarlagnum hjá Kringvarpi Føroya, og tí má stovnurin áhaldandi stríðast fyri, at føroyingar hava álit á stovninum. Tað er torført og stríggið at vinna sær álit, ímeðan tað skal lítið til, áðrenn tað minkar.

Sum ein liður í tilgongdini at styrkja og marknaðarføra almenna miðlastovnin, ger Kringvarp Føroya afturvendandi kanningar, har eitt nú verður kannað, hvat álit føroyingar hava á stovninum.

Spyr.fo hevur síðani februar í 2016 kannað álitið hjá Kringvarpi Føroya, har 400 fólk umboðandi alt landið og eldri enn 15 ár, hava svarað nøkrum spurningum í sambandi við álit á føroyskar miðlar og KvF.

Skal metast sakliga um álitið á almenna miðlastovnin, mugu sannroyndir og fakta fáast til vega. Haldgóðar kanningar er tað frægasta, men ein afturvendandi spurnarkanning gevur eisini toluligar ábendingar.

### Hvørjum tíðindamiðli hevur tú størst álit á?




*Talvan er frá seinastu kanningini (apríl 2017) og vísir álitið í prosent um á føroyskar miðlar.*

Avrit frá kvf.fo

### Hvørjum tíðindamiðli hevur tú størst álit á?




*Talvan vísir, hvussu álitið í prosentum hevur verið í kanningunum um miðlapallarnar hjá Kringvarpi Føroya.*

Álitisbarometrið gongur frá 1 upp til 7, sum er fult álit.
Álitið er kannað seks ferðir og 4,41 er hægsta meting. Í seinasta kanningini lækkaði barometrið niður á 4,38, sum kortini er næsthægsta meting. Heildarmyndin vísir, at álitisbarometrið hækkar støðugt.
Talvan niðanfyri vísir samlaða álitið á føroyskar miðlar í mun til álitið á Kringvarp Føroya.

## Álit á Føroyskar tíðindamiðlar samanborið við álit á KVF




Avrit frá kvf.fo

## Álit áKVF sum tíðindamiðil




## Álit áføroyskar tíðindamiðlar generelt




*Talvurnar vísa neyvari, hvussu álitistølini í prosentum eru flokkað á stiganum frá 1 til 7. Ovara talvan er Kringvarp Føroya, og niðara talvan eru aðrir miðlar sum heild.*

# Kringvarp Føroya í tølum

Framleiðslan ella beinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya í 2016 vóru 34,9 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka deildirnar; Aktuelt, Mentan og partin av Tøknideildini, sum er framleiðsla.

Óbeinleiðis útreiðslurnar í 2016 vórðu 29,6 mió. kr. Hetta er kostnaðurin at reka Fyrisitingina og Tøknideildina, sum ikki er framleiðsla. Óbeinleiðis útreiðslur fevna eisini um kostnaðin í sambandi við rættindi, íløgur og rentur & avskrivingar.

Talvan vísir, hvussu beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslurnar eru býttar.

Talvan vísir, at deildin Tøkni fevnir bæði um beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur. Á deildini eru fólk í beinleiðis hava við framleiðslu at gera, sum eitt nú fotografar, og fólk, sum ikki hava nakað við framleiðslu at gera, eitt nú KT-fólk, húsavørður v.m. Hesi fólk hjálpa stundum til við ymiskum sendingum, so óbeinleiðis útreiðslur eru ikki allar óbeinleiðis.

Fyrr var meira javnvág ímillum beinleiðis- og óbeinleiðis útreiðslur, men seinnu árini er meira peningur nýttir til public service tilfar á ymsu miðlapallunum, og minni er brúkt til óbeinleiðis útreiðslur. Í 2016 er munurin 5,3 mió.kr.

| **Beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur** | | |
|---|---|---|
| **Upphæddir í kr.** | **Beinleiðis** | **Óbeinleiðis** |
| Aktuelt/GMF | 11.372.106 | |
| Heimasíðan | 791.172 | |
| Mentan | 12.393.333 | |
| Tøkni | 10.353.716 | 12.658.540 |
| Fyrisiting | | 8.042.174 |
| Rættindi | | 4.129.000 |
| Íløgur | | 3.948.344 |
| Rentur og avskrivingar | | 812.248 |
| **Samanlagt** | **34.910.327** | **29.590.306** |

4,9 mió.kr. ella 54 prosent av samlaða fíggjarkarminum verða brúkt til at framleiða miðlatilfar. 29,6 mió.kr. ella 46 prosent verða brúkt til alt annað virksemið í Kringvarpi Føroya.

## Beinleiðis útreiðslur

Beinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya eru útreiðslur, stovnurin brúkar til at gera public service tilfar til miðlapallarnar; útvarp, sjónvarp og heimasíðu. Býtið ímillum ymsu deildirnar, sæst í talvuni til høgru.

Talvan vísir, at Aktuelt, sum umfatar allar tíðindasendingar í KvF, allar aktueltsendingar og morgunsendingina í útvarpinum, brúkar 11,4 mió.kr. av beinleiðis útreiðslunum. Hetta svarar til 32,6 prosent. Heimasíðan hoyrir til deildina, og hon kostar 791.000 kr. ella 2,3 prosent.

| **Beinleiðis útreiðslur** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Deild** | **kr.** | **kr.** | **%** |
| 5.2.1 | Aktuelt/GMF | | 11.372.106 | 32,6% |
| 5.2.1.1 | Heimasíðan | | 791.172 | 2,3% |
| 5.2.4 | - Mentan | 6.332.058 | | |
| 5.2.5 | - Átrúnaður | 720.891 | | |
| 5.2.6 | - Ítróttur | 1.212.632 | | |
| 5.2.7 | - Børn og Ung | 2.789.952 | | |
| 5.2.8 | - Tónleikur | 574.224 | | |
| | - Skrá og ymiskt annað | 763.576 | | |
| | Mentan: | | 12.393.333 | 35,5% |
| | Tøkni framl. | | 10.353.716 | 29,7% |
| | Beinleiðis útreiðslur | | **34.910.327** | |
| | Óbeinleiðis útreiðslur | | 29.590.306 | |
| | **Samanlagt KvF** | | **64.500.633** | |

Mentan, sum umfatar at kalla allar aðrar sendingar í KvF, brúkar 12,4 mió.kr. av beinleiðis útreiðslunum. Hetta svarar til 35,5 prosent. Talva 2 vísir, at Mentan í samsvari við public service sáttmálan er býtt sundur í smærri øki, har eitt nú kostnaðurin til ítrótt er 1,2 mió.kr. og kostnaðurin til børn og ung er 2,8 mió.kr.

Á Tøknideildini eru fleiri fólk, eitt nú fotografar og sendifólk, sum eru við í beinleiðis framleiðslu. Tøkniliga framleiðslan er 10,4 mió.kr., og tað svarar til 30%.

Avrit frá kvf.fo




## Óbeinleiðis útreiðslur

Óbeinleiðis útreiðslurnar í 2016 vórðu 29,6 mió.kr. Hetta er kostnaðurin at reka fyrisitingina, partin av deildini Tøkni, sum ikki hevur beinleiðis við framleiðslu at gera, útreiðslur til rættindi, íløgur og rentur & avskrivingar.

| Óbeinleiðis útreiðslur | | |
|---|---|---|
| **Upphæddir í kr.** | **kr.** | **kr.** |
| Fyrisiting, lønarpartur | 4.888.185 | |
| Vørur og tænastur | 3.153.989 | 8.042.174 |
| | | |
| Tøkni, lønarpartur ikki framleiðsla | 4.682.237 | |
| KT, húsakostnaður, akfør, samskifti o.a. | 7.976.303 | 12.658.540 |
| | | |
| Rættindi ísv tónleik, upplestur og sendingar | | 4.129.000 |
| Íløgur, leiga og viðlíkahald | | 3.948.344 |
| Avskrivingar, skuldarar | | 812.248 |
| Óbeinleiðis útreiðslur | | **29.590.306** |
| Beinleiðis útreiðslur | | 34.910.327 |
| **Samanlagt KvF** | | **64.500.633** |

Talvan vísir, hvussu óbeinleiðis útreiðslurnar hjá Kringvarpi Føroya eru býttar sundur á ymsu økini.

Talvan vísir, at samanlagt verða 29,6 mió.kr. brúktar til óbeinleiðis útreiðslur. Strikumynd 3 vísir býtið í prosentum.

## Væntað framleiðsla í 2017

Kringvarpið hevur spakuliga økt um virksemi sítt seinnu árini, har serliga økini "Aktuelt" og "Barna & Ungdómsøkið" eru raðfest, sum KvF-stýrið hevur ynskt. Sjónvarpstíðindini fara ikki longur í summardvala, men eru á skránni alt árið, tó tvær ferðir um vikuna eitt stutt tíðarskeið um summarið, tá flestu starvsfólkini eru í feriu.

Kringvarp Føroya metir, at lutfalsliga býtið millum sendingarnar í 2017 verður á leið tað sama, men at framleiðslan økist eitt sindur.

Avrit frá kvf.fo






# Fiskivinnunýskipan, Kommunuval, og skattamálið hjá Eik

Komandi fiskivinnunýskipanin, kommunuvalið og skattamálið hjá Eik settu sín dám á framleiðsluna hjá Aktuelt í 2016.

## Dokumenteraðu fiskivinnuna

Fiskivinnunýskipanin hevur fylt nógv í tíðindaflutninginum seinastu árini, og árið í fjør var onki undantak. Árið byrjaði eisini við tveimum kritiskum dokumentarsendingum um fiskivinnuna, sum fingu heitið "Stríðið um tey 10 prosentini". Í sendingunum varð lýst, hvussu tilfeingið í sjónum savnast á alt færri hondum, og spurnartekin varð sett við, um tað eru politikarar ella vinnan, sum skipa fiskivinnuna.

## Kjak kring landið

Kringvarpið samstarvaði í fleiri førum við privatfólk og felagsskapir um kjakfundir. KvF var millum annað í Klaksvík bæði til torradagarnar og sjómannadagarnar og leiddi kjak um komandi fiskivinnunýskipanina.

## Skattamálið hjá Eik



Tíðliga í 2016 gjørdist greitt, at stríð var um ein skattafrádrátt, sum, vísti tað seg, Eik Banki hevði fingið av órøttum. Umframt nógv tíðindainnsløg, so gjørdi Kringvarpið eisini eina kritiska dokumentarsending um málið, "Skattamálið". Skattamálið er største skattamál í Føroya søgu. Miðlahúsið og Kringvarpið valdu tí at samstarva um hetta stóra mál. Bankavirksemi og skattaviðurskifti eru ikki fevnd av almennum innliti, og krevur tí, at keldur varskógva miðlarnar, og tað setur stór krøv til kelduverjuna.

## Søgdu frá um Brexit

Europa er á einum vegamóti. Á sumri í fjør atkvøddu bretar fyri at fara úr ES. Kringvarpið hevði fólk á staðnum, sum lýstu fólkaatkvøðuna og avleiðingarnar av henni.

## Mintust fólkaatkvøðuna í 1946

Í fjør vóru eisini 50 ár liðin síðani fólkaatkvøðuna í 1946. KvF gjørdi tvær stakar sendingar um sjálva fólkaatkvøðuna og komandi stjórnarskipanina í tí sambandinum.

## Gjørdu nógv burtur úr kommunuvalinum

Fyrireikingar til kommunuvalið byrjaðu longu á heysti 2014, tá grafikkur bleiv gjørdur og keyptur frá Danmarks Radio til fólkatings- og løgtingsval í 2015 og kommunuvalið í 2016.

Í november var kommunuval og allir miðlar hjá Kringvarpinum gjørdu nógv burturúr. Kommunuvalið er í veruleikanum 29 sjálvstøðug val, tí er tað ringt at gera ein yvirskipaðan dekning av kommunuvalinum. Tó so, tað eru nógvar av teimum somu avbjóðingunum, sum ganga aftur í teimum ymsu kommununum. Tí skipaði KvF dekningin meira tematiskt heldur enn geografiskt, men vildu samstundis út at hitta borgarar í landinum og lýsa evnini á kommunuvalinum úr teirra sjónarhorni.

Tvær vikur fyri valið varð valdekningurin skotin í gongd. KvF hevði ein valbuss á ferð, sum ferðaðist kring alt landið og gjørdi tilfar til allar miðlapallar. KvF gjørdi eitt valmagasin í Degi og Viku, sum fór í djúpdina við ymsum kommunalum uppgávum og skyldum, sum ikki altíð verða røkt til fulnar.

Avrit frá kvf.fo

Heimasíðan hevði eina væl vitjaða temasíðu, sum savnaði allar søgur, sum snúðu seg um kommunuval. Og sum nakað nýtt vóru sosialu miðlarnir eisini tiknir við í valdekningin. Tað er ein sannroynd, at nógvir av teimum yngru veljarunum fá sína vitan umvegis sosialu miðlarnar, so hetta var serliga fyri at røkka teimum. KvF kom á Snapchat, og vit vóru sera virkin á Facebook og Instagram.

## Øll til arbeiðis valdagin



Sjálvan valdagin og -kvøldið vóru so gott sum øll starvsfólk í Kringvarpinum til arbeiðis. Útvarpið sendi valtilfar næstan allan dagin og kvøldið. Reportarar vóru kring alt landið og lótu støðulýsingar til útvarp og heimasíðu og myndir og tilfar varð lagt á sosialu miðlarnar.
Ungdómsredaktiónin hjá Kringvarpinum, Røddin, var eisini til arbeiðis valdagin. Hesi skuldu í høvuðsheitum dagføra sosialu miðlarnar.
Valkvøld eru í stóran mun sjónvarpskvøld, og tí var mest orka løgd í sjónvarpsframleiðsluna um kvøldið. KvF høvdu sjónvarpslið kring alt landið, sum gjørdu innsløg frá kommununum og komu beinleiðis ígjøgnum við støðulýsingum og úrslitum. Í sjónvarpsstovuni hevði KvF vertir og serfrøðing, sum greinaði úrslitini so hvørt tey vóru almenn. KvF sendi beinleiðis sjónvarp í seks tímar.
Eftirsum kommunuvalið var ein týsdag, hevði KvF Dag og Viku á skrá mikudag.

## Mentan á Aktuelt

Hóast Aktueltdeildin mestsum fæst við tíðindaflutning burturav, so virðismetir deildin mentan og ynskir at økja tilvitskuna um føroysku mentanina og málið í aktuellu sendingunum. Mentan er fastur táttur í Degi og Viku, sum er einasta regluliga sjónvarpssending í Kringvarpinum. Aktuelt leggur seg eftir, at hava eina mentanarrundferð hvørja viku, at kjakast um mentan og viðgera mentanarpolitikkin í landinum. Somuleiðis ynskir Aktueltdeildin at kveikja mentanina.
Góðan morgun, Føroyar virkar á stóran hátt sum ein sýnisgluggi fyri føroysk listafólk, sum sleppa í útvarpsstovuna at spæla løg, greiða frá síni list osfr.

## Ársins orð

Góðan Morgun Føroyar tók saman við Málráðnum stig til at kjósa ársins orð í fjør. Nógv uppskot vórðu send inn og at enda stóð “hjúnabandslóg” eftir sum ársins orð.

## Kvf.fo

Mestsum øll tíðindi verða gjørd til útvarp, sjónvarp og web. Tad vil siga, at øll tíðindi, sum verða gjørd til annaðhvørt útvarpstíðindini, Dag og Viku ella Góðan Morgun Føroyar, verða eisini løgd á heimasíðuna hjá Kringvarpinum.
Harafturat eru allar útvarps- og sjónvarpssendingar tøkar á heimasíðuni. Sumt verður gjørt burturav til heimasíðuna og sosialu miðarnar. Til dømis verða tíðindafundir og onnur tiltøk ofta stroymd beinleiðis á heimasíðuni.

## Tilbúgving

Jólini vóru merkt av, at ódnarveður herjaði um oyggjarnar, tá tvær ódnir raktu oyggjarnar uppá tríggjar dagar. Stórur materiellur skaði stóðst av ódnunum, men lukkutíð ongin mansskaði. Kringvarpið kunnaði umvegis útvarpið og heimasíðuna um støðuna kring landið og fekk á tann hátt allar fráboðanir frá løgreglu og bjargingarfólki annars út til borgararnar.
Hetta setti stór krøv til Kringvarpið, sum er partur av tilbúgvingini. Tíanverri er henda tilbúgving ikki nóg væl samskipað, og tað gongur út yvir kunningina til borgaran. Eftirmetingin av tilbúgvingin førdi eisini til, at tilbúgvingarsamskipari nú er settur í starv í Fiskimálaráðnum.

Avrit frá kvf.fo

# 435 tímar við mentan til allar føroyingar

Kringvarp Føroya er fremsti mentanarberi landins. Mentanin er tí eitt kjarnuøki í Kringvarpinum. Á deildini mentan eru 18 starvsfólk og ein deildarleiðari. Økið fevnir víða – frá børnum, umvegis siðsøgu, tónleik, samfelag og átrúnað. Kringvarpið leggur stóran dent á at hava sendingar fyri allar føroyingar – á bygd og í bý og ung, miðaldrandi og gomul – men í 2016 løgdu vit serligan dent á tilfar til børn. M.a. fingu vit eina nýggja heimasíðu til tey smáu.








## KVF raðfestir børn og ung

*Barnaútvarpið:*

# Ævintýr, spenningsbók og klassikarar

Í barnaútvarpinum varð lagt fyri við at hoyra ævintýr. Barnaútvarpið hava lagt okkum eftir at lesa inn øll ævintýrini í nýútkomnu føroysku ævintýrabókini – Einaferð var tað. Hesi eru endursøgd og ljóðviðgjørd. Eisini var ljóðmyndin um Magnus Heinason send í januar í 2016. Barnaútvarpið leggja dent á at hava gott føroyskt mál og hava fjølbroytta fiktión, soleiðis, at vit kunnu upplýsa um søgu, samtíð og samstundis undirhalda við dygdargóðum tilfari, og at børnini kenna seg aftur. Barnaútvarpið hava gjørt fleiri útvarpsleikir, eitt nú spenningsbókina – Loyndarmálið í Venezia og stuttligu bókina um Samson og Roberto. Eisini er lagt okkum eftir at senda klassikarar, so sum Froskaslottið, eftir Jostein Gaarder og Børnini í Brakarastræti eftir Astrid Lindgren.

### BÚ fekk íblastur í DR

Vit í barnaútvarpinum vóru í Keypmannahavn og fingu góðan íblástur, tá ið vit vóru á vitjan hjá DR í august. Vit fingu innlit í teirra framleiðslu, og hvat tey hugsa, hvussu tilfar til børn, skal framleiðast. Vit komu eisini heimaftur við nógvum góðum tilfari til sendingar. Vit vitjaðu føroysk børn í Keypmannahavn, sum vit settu saman til eina viku við yvirskriftini – samleiki. Í sendingunum vóru eisini børn úr Thailandi, India og Serbia, sum søgdu sína hugsan. Vit hava gjørt sendingar við granskarum, fyri at kveikja áhuga hjá børnum fyri gransking og vitan. Úr djóragarðinum í Keypmannahavn fingu vit eina rúgvu av tilfari, hetta fyri at vísa á, hvussu djóralívið er og so er eisini áhugavert at hoyra um djór, sum vit ikki kenna í Føroyum.

### Tilbúgvingarvika í BÚ

Vit gjørdu eina tilbúgvingarviku í samband við nýggju barnasendingina – Morsa. Vit vitjaðu vaktarskipið Tjaldrið, tyrluna hjá Atlantic Airways og so lærdu vit at Morsa á Vørn. Eisini fyri at varpa ljós á tilbúgving og fáa innlit í tað arbeiðið.

Umframt alt hetta, so kann nevnast, at vit eisini leggja okkum eftir at ferðast kring landið og práta við børn. Vit hava havt fasta táttin – Lova mær við, har børn bjóða okkum við til eitthvørt og vit hava gjørt fleiri viðkomandi sendingar, har børn siga frá tiltøkum og øðrum.

Avrit frá kvf.fo



## Barnasjónvarpið



### Orrusta – 200 vildu vera við

Tað var ein góð kensla at bjóða hyggjaranum 2. umfar av spurnakappingini – Orrusta. Vit høvdu upptøkuroynd til sendingarnar, so torført var at velja millum tey 200 børnini, tí børnini vóru dugnalig og høvdu áhugaverd og fjølbroytt frítíðarítriv. Tað var ein fyrimunur, at børn og vaksin kendu til spurnakappingina, tí vit fingu sera góðar afturmeldingar, og tey kendu mannagongdina.

### Alt um djór

Týskvøld senda vit røðina – Alt um djór. Røðin er frá BBC og er við føroyskum frásøgufólki. Her fáa vit nógva vitan um ávís djór, borðreidda við flottum og frásigandi myndum. Hetta vilja vit halda fast við, tí vit meta, at vit megna at undirhalda og kveikja vitan við dygdargóðum tilfari á føroyskum.

### Teknirøðir

Frá BBC bíløgdu vit eisini teknirøðina – Klumparnir, sum vit sendu mikukvøld í Snipp-Snapp. Fleiri børn løgdu føroyskar røddir til – Klumparnir. Røðin var ætlað smærri børnum, har barnavertir presenteraðu stuttliga teknifilmin og tveir aðrir stuttar teknifilmar.

### Morsa



Á heysti 2016 sendu vit nýggju barnasendingina – Morsa. Her var vertur, sum lærdi børnini at morsa (morse code). Hetta var gjørt í samband við røðina Katie Morage, sum vit bíløgdu frá BBC. Vit valdu at leggja føroyskar røddir á og at spæla ein part í Morsa hvørt fríggjakvøld. Katie Morage hevur vunnið Bafta prís, og hon minnir eitt sindur um okkara oyggjasamfelag. Umframt hetta, so var innslag við flættum. Vit hava varnast, at børn leita á youtoube eftir ymiskum uppskriftum og øðrum. Tí valdu vit at taka upp, meðan gentur verða flættaðar, soleiðis at tað eisini kann liggja á okkara heimasíðu.




### Heimasíðan "Vit"

Nú hava fleiri og fleiri fingið eygð á heimasíðuna hjá okkum. Børn og vaksin kenna Kuldakrákuna og fara inn á Vit.fo at hyggja og lurta. Vit bjóða teimum eitt savn av søgum og sendingum, sum hava verið, umframt at vit hava rættindi at hava sjónvarpsendirøðirnar liggjandi 14 dagar eftir, at tær eru sendar.
Í 2016 kliktu børn og vaksin seg 708.862 inn á barnatilfar á Vit-síðunum
Í samband við Orrustuna, bjóðaðu vit eina spennandi spurnakapping á heimasíðuni, sum var sera vælumtókt. Eisini lógu myndir og tíðindastubbar um luttakarar og um Orrustuna inni á Kuldakrákuni.

Flætturnar úr Morsa sendingunum fingu sítt frálíka pláss.

Børn kunnu tekna seg til sendingina – Lova mær við og skriva góð hugskot til okkara á heimasíðuni. Og annars til høgtíðir og serstakar dagar ber til hjá børnum at senda myndir og søgur inn. Fyri jól fingu vit eina ørgrynnu av søgum inn, sum vóru at hoyra á jólum í barnaútvarpinum.

Avrit frá kvf.fo

## Røddin fyri tey ungu

Í 2013 tók Krinvarpið upp samstarv við Ung og tók yvir ungdómspallin Røddina. Skiftandi ung hava tikið sær av hesi heimasíðuni, sum bæði hevur greinir, samrøður, video-brot o.a. Ein samskipari er og ein í Kringvarpinum er bindingarliður millum partarnar.

Eisini er skipað fyri skeiðum – í journalistikki, framleiðslu og í pressuetikki.

Árið eftir fóru ung eisini at gera ungdómssendignina, Røddin, sum er send fríggjakvøld. Kanska ikki besta tíðin, og tað hevur kanska avmarka lurtaraskaran.

Evnini á heimasíðuni og í sendingini er mál, sum eru viðkomandi fyri ung. Men treyðugt so. Tilkomin bæði lesa heimasíðu og lurta, tí onkuntíð hava verið evni, sum hava provokerað, so Røddin hevur elvt til kjak, sjálvt á tingi.




Avrit frá kvf.fo

## Aðrar sendingar á Mentan




### Breddin – kjak og hugleiðinar um aktuell mál

Breddin var nýggj kjaksending, sum kom á skránna seint í 2016. Málið við sendingini var at luttakararnir hugleiddu og kjakaðust um ymisk aktuell mál ella rák, sum eru uppi í tíðini. Fyri jól vóru fimm sendingar, og eftir jól vóru 10 sendingar.

Evnini fevndu breitt, og talan var um bæði politisk, etisk, hugsjónarlig, altjóða og føroysk viðurskifti. Í sendingini kjakaðust tríggir luttakarar, um trý evni í trý korter. Kjakararnir høvdu við sínari bakgrund góðan førleika at leggja okkurt afturat evnunum, sum vit dagliga hoyra ella eru vitni til.

Soleiðis hoyrdi vit millum annað sálarfrøðingar, bókmentafrøðingar, lærarar, leiðsluráðgevar og fólk við filosofiskari bakgrund kjakast um tað, sum er uppi í tíðini. Millum kjakevnini vóru etiska ráðið, stjórnarskipan, val úti og heima, public service, lýsingar, aktiv deyðshjálp, turisma og mangt annað við einum aktuellum broddi.

### Á Quiztinum



Eftir at hava sett teimum 32 luttakarunum 469 spurningar, endaði spurnarkappingin Á Quiztinum við einari stórari finalu á Reinsarínum í Havn, sum var fullsett hetta kvøldið.
Og tað vóru Marius Rein og Páll Holm Johannesen, sum vunnu finaluna móti Símuni Joensen og John Petersen.

### Mentanarcaféin

Í vetrarskránni 2015/16 varð Mentanarcaféin send í tveir tímar frá kl. 19 til 21. Og við frásagnum, samrøðum og ummælum vórðu evni sum eitt nú arkitekturur, bókmentir, filmur, leiklist, myndlist, og tónleikur viðgjørd.
Seinasta Mentanarcaféin í vetrarskránni 2015/16 varð send beinleiðis úr Listastovuni í Miðvági, har eisini fitt av fólki vóru komin á gátt, og har borðreitt varð við livandi tónleiki, samrøðum og ummæli. Eitt nú varð Vágasound viðgjørt sum fyribrigdi, spurt var hvat eyðkennir vágamentan, eins og arkitekturin í Vágum. Kvøldið eydnaðist væl, og eftir ætlan fer Mentanarcaféin eisini at verða send um landið við áskoðarum nakrar ferðir í vetrarskránni 2016/17.

### Koba & Vatnhamar



Fýra partar av sjónvarpsrøðini Koba & Vatnhamar vóru gjørdir í 2016. Konseptið er at síggja støð, har fólk vanliga ikki koma, siga søgur úr Føroyum, og hyggjarin skal tilluta sær vitan á ein øðrvísi hátt.

Hetta má sigast at hava eydnast sera væl, tí serliga tey ungu hava tikið væl ímóti hesum sendingum. Ein málbólkur, ið public service rásir hava trupult at røkka. Eftir ætlan verða fýra partar aftrat av Koba & Vatnhamar framleiddir í 2017.

## Nýggjárssending 2016

Á nýggjárinum gjørdu vit eina nýggjárssending. Sendingin vardi í góðar fýra tímar og hyggjarar tóku sera væl ímóti hesu sending. Í sendingini fingu vita sjónvarpsheilsanir frá føroyingum uttanlands, innsløg vóru gjørd í øllum landinum og fleiri tónleikarar framførdu.



## Vitan

Tíggju sendingar av útvarpsrøðini Vitan vórðu gjørdar í 2016/17. Vitan er vísindasending, og í hesum umfarið hava fleiri evni verið viðgjørd, alt frá teimum fyrstu føroyingunum, ið komu til landið fyri fleiri túsund árum síðani, um føroying ið navigerar úti í rúmdini, og hvussu Føroyar hava ment seg demografiskt.

## Mínir barnaskógvar

Mínir barnaskógvar var summarsending, har farið var á ferð um landið við einum gesti, sum segði frá um síni barnaár og um umhvørvið, har viðkomandi vaks upp, samstundis sum kryddað varð við tónleiki frá umrødda tíðarskeiði.

Og tey, sum farið varð í barnaskógvarnar saman við, vóru Jóanis Nielsen úr Sandavági, Ósbjørn Jacobsen í Syðrugøtu, Sunleif Rasmussen heima á Sandi, Gyðja Hjalmarsdóttir í Vestmanna, Jógvan Eliasen í Klaksvík, Jørgen Niclasen í Sørvági, Regin Jacobsen á Glyvrum, Sirið Stenberg í Vági og Katrina í Geil í Havn.

Avrit frá kvf.f

## Merkisdagar

Kringvarpi leggur stóran dent á at varpa frá ymiskum merkisdøgum. Sum siður er, so hevur verið sent beinleiðis frá grækarismessuhaldi, flaggdagshaldi, 1 mai dagshaldi og á ólavsøku. Eisini hevur verið sent frá hátíðardøgum, har kirkjur hava havt serstakan dag.

## J.H.O Djurhuus 135 ár

Síðst í februar vóru tað 135 ár liðin, síðan Janus Djurhuus varð føddur. Í hesum sambandi var hátíðarkonsert á Reinsarínum, ið Kringvarpið tók upp og varpaði út í sjónvarpinum.




## Roynd í 25 minuttir

Síðst í árinum varð tátturin "25 minuttir" tikin upp aftur í sjónvarpinum. Fyrst varð sendingin gjørt sum ein roynd, men kom rættliga skjótt í fasta legu. Nakrar heilt fáar vóru gjørdar síðst í 2015, men í 2016 og fyrru helvt av 2017 eru yvir 20 sendingar "25 minuttir" gjørdar.

## Vaksin í Orrustu

Eftir sum Kringvarpið hevði brúkt nógva orku at gera studio til barnasjónvarpskappingina Orrustan, so varð hildið, at tað var upplagt at brúka karmarnar til eina spurnarkapping til vaksin. Tí varð Orrustan – vaksin tikin upp í fyrru helvt í 2016. 10 partar vórðu tiknir upp í eina viku, tveir um dagin.

## Dokumentarur um Parkinson

Í nærum eitt ár fylgdi eitt sjónvarpslið, av og á, tveimum kendum monnum, John William Joensen og Elisi Poulsen, ið høvdu fingið staðfest sjúkuna Parkinson. Tvífalt so nógvir føroyingar hava Parkinson samanborið við onnur lond, og tí varð sjónvarpssending gjørd um hesa sjúku. Hon var sera væl dámd.



## Surk

Hvønn leygardag í 2016 var seinnapartssendingin Surk á skránni. Hetta er løtt útvarpssending, har pulsurin varð tikin av, hvat ið fyrifórst, bæði her á landið og uttanlands, ein leygardag. Áhugin fyri sendingini tóktist vera sera stórur, tí nógv vendu sær til Kringvarpið um tað, sum fór fram ella hendi.



## Nýggjárskonsert

Stóra nýggjárssendingin í Norðurlandahúsinum varð varpað út í sjónvarpinum. Talan er um eitt samstarv millum Kringvarpið, Føroya Symfoniorkestur og Norðurlandahúsið. Sendingin er rættiliga kostnaðarmikil. Nógv fólk, myndafólk, tøkningar og onnur, skulu seta upp og fyrireika ta stóru sendingina. Harafturar kemur kostnaður fyri rættindi. So talan er um eina stóra framleiðslu hjá Kringvarpinum, men hyggjarar og lurtarar fáa eina góða uppliving.

## Eplafestivalur í Sandoynni 2016

Árligi eplafestivalurin varð hildin í oktober í Sandoynni. Kringvarpið fekk fríyrkisfólk, Eir í Ólavsstovu, at gera eina sjónvarpssending um festivalin.

## Kjak um ríkisfelagsskapin

Í sambandi við, at donsk røð, ið var gjørd í samstarvi við Kringvarpið, varð víst í sjónvarpinum, skipaði KvF fyri seks kjaksendingum um ríkisfelagsskapin.





*Nýggj tøkni við nýggjum møguleikum:*

# Ítróttur í 380 tímar í Kringvarpinum



### Stroyma alsamt meira ítrótt

Við nýggjari tøkni, live-views, er tað munandi lættari og bíligari hjá Kringvarpinum at stroyma beinleiðis sjónvarp umvegis internetið.

Á sumri í 2016 setti ítróttarredaktiónin sær fyri at taka av hesum møguleikanum. Í 2016 stroymdi Kringvarpið frá bestu fótbóltsdeildini hjá monnum og hondbóltskappingini hjá kvinnum og monnum. HM-undankappingardystir hjá kvinnulandsliðnum í hondbólti og flogbolti vórðu eisini stroymdir beinleiðis.

Hesin møguleikin er eitt frambrot, tí nú kann brúkarin hjá Kringvarpinum regluliga síggja beinleiðis ítrótt á skíggjanum.



### Sparta

Móti ársloki í 2016 setti ítróttarredaktiónin sær fyri at menna eina útvarpssending, sum perspektiverar og viðger føroyskan ítrótt úr øðrvísi sjónarhornum. Úrslitið varð Sparta, sum varð send í útvarpinum hvønn hósdag.

### Fótbóltskjak á internetinum

Í 2016 fór ítróttarredaktiónin eisini at hava fótbóltskjak, sum verður sent einaferð um vikuna. Kjakið vendir sær til ein ávísan málbólk, sum hevur møguleika at síggja kjakið á kvf.fo. Tað verður umhugsað at seta fótbóltskjakið á sjónvarpsskránna eisini.

### KVF sendi ikki umboð til OL og útidystir hjá landsliðnum

Kringvarpið var ikki til OL í Rio, har Pál Joensen svam í svimjifinalu. Finalan varð víst í sjónvarpinum við frásøgn.

Afturímóti var Kringvarpið til staðar við einum myndafólki, tá Pál Joensen svam í heimsmeistarakappingini í svimjing í Russlandi. Innsløg vórðu gjørd, og svimjikappingarnar vórðu keyptar frá altjóða útbjóðara og vístar í sjónvarpinum.

### Ikki til A-landsdystir

Sami leistur – sum við svimjingini í OL – varð valdur fyri útidystirnar hjá A-landsliðnum í fótbólti, har einki umboð fyri KVF var á staðnum. Tað er kostnaðarmikið at fara avstað við frásøgufólki og tøkningi, og leiðslan í Kringvarpinum hevur hildið, at tann spardi peningurin kann brúkast til annað á hesum øki. Í staðin varð frásøgn – saman við fótboltsviðmerkjara – í studio.

Avrit frá K

## Kappróður í sjónvarpinum



Kringvarpið hevur í nøkur ár stroymt kappróður beinleiðis á kvf.fo. Tað hevur eydnast somikið væl, at í fjør varð stroymingin víst í sjónvarpinum. Kringvarpið vísti allar sjey FM-kappróðrarnar beinleiðis í sjónvarpinum. Róðrarnir vórðu eisini sendir beinleiðis í útvarpinum. Ætlanin er at gera tað sama í 2017.

## Hendingaríkt ár

2016 var eitt sera hendingaríkt ár í ítrótti. Til flestu umførini í fremstu fótbóltskappingini hjá monnum var frásøgn í útvarpinum, og útvarpið segði eisini frá FM-finalunum í flogbólti og hondbólti. Eisini sendi Kringvarpið beinleiðis sjónvarp frá FM í fimleiki. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir allar tær stóru sjónvarpsframleiðslurnar í 2016.






Avrit frá kvf.fo

### Størri ítróttarframleiðslur í 2016

| | |
|---|---|
| 13-02-2016 | Steypafinalurnar í hondbólti (sjónvarp) |
| 20-02-2016 | Steypafinalurnar í flogbólti (sjónvarp) |
| 02-04-2016 | Stóri FM-dagurin í badminton, borðtennis og judo (sjónvarp) |
| 04-05-2016 | FM í svimjing dagur 1 (sjónvarp) |
| 05-05-2016 | FM í svimjing dagur 2 (sjónvarp) |
| 06-05-2016 | FM í svimjing dagur 3 (sjónvarp) |
| 16-05-2016 | FM í estetiskum fimleiki (sjónvarp) |
| 04-06-2016 | FM kappróður í Klaksvík (sjónvarp og útvarp) |
| 11-06-2016 | FM kappróður í Hvalvík (sjónvarp og útvarp) |
| 18-06-2016 | FM kappróður í Runavík (sjónvarp og útvarp) |
| 02-07-2016 | FM kappróður í Vági (sjónvarp og útvarp) |
| 09-07-2016 | FM kappróður í Vestmanna (sjónvarp og útvarp) |
| 16-07-2016 | FM kappróður í Sørvági (sjónvarp og útvarp) |
| 28-07-2016 | FM kappróður í Havn (sjónvarp og útvarp) |
| 12-08-2016 | OL-finala í 1.500 m. Pál Joensen (sjónvarp, frásøgn úr kvf) |
| 27-08-2016 | Steypafinalan í fótbólti, menn (sjónvarp og útvarp) |
| 03-09-2016 | Steypafinalan í fótbólti, kvinnur (sjónvarp) |
| 06-09-2016 | HM undankappingardystur í fótbólti, Føroyar-Lettland (sjónvarp og útvarp) |
| 07-10-2016 | HM undankappingardystur í fótbólti, Lettland-Føroyar (sjónvarp, frásøgn úr kvf) |
| 10-10-2016 | HM undankappingardystur í fótbólti, Føroyar-Portugal (sjónvarp og útvarp) |
| 13-11-2016 | HM undankappingardystur í fótbólti Sveis-Føroyar (sjónvarp, frásøgn úr kvf) |

# 40 prosent er føroyskur tónleikur

Kringvarpið hevur seinastu árini lagt seg eftir at spæla nógvan føroyskan tónleik.
Í 2016 var umleið 40 prosent av spælda tónleikinum í útvarpinum føroyskur. Tað eru góð trý prosent færri enn í 2015, og høvuðsorsøkin til hetta er, at færri føroyskar útgávur komu út í 2016 enn árið fyri.
Kringvarpið hevur altíð dent á at lata góðan føroyskan tónleik sleppa at royna seg. Fleiri "stjørnur" hava fyri fyrstu ferð hava fingið høvi at royna síni evni at spæla ella syngja í Kringvarpinum.
Nógv av tí elsta føroyska popp-tónleikinum var fyrstu ferð at hoyra í Útvarpinum í teimum fyrstu árunum hjá Útvarpinum, og sumt varð tikið upp á Bryggjubakka. Tí kann sigast, at Kringvarpið eigur sín lut í at menna føroyskan tónleik.
Hetta er ein kós, sum vit halda fram við, og ofta er beinleiðis tónleikur at hoyra, t..d. í Góðan Morgun Føroyar.
Umframt tær vikuligu sendingarnar, vórðu eisini aðrar stakar tónleikasendingar í útvarpinum og sjónvarpinum í samband við høgtíðir og merkisdagar

## Spæl føroyskt vika

Spæl føroyskt vikan varð í útvarpinum frá 7. til og við 13. mars. Í hesum tíðarskeiði varð einans føroyskur tónleikur spældur í øllum nýggjum sendingum og rundan um sendingar annars.



## Music Awards triðju ferð

Skipað varð fyri Faroese Music Awards á triðja sinni tann 11. mars í Norðurlandahúsinum, og fyri fyrstu ferð varpaði KvF tiltakið beinleiðis í bæði í útvarpinum og í sjónvarpinum.

## Tóku nógvar konsertir upp

Umframt Faroese Music Awards tók Kringvarpið í 2016 hesar konsertir upp:

1. Nýggjárskonsertin við Føroya Symfoniorkestri
2. Konsert við Føroya Symfoniorkestur, verk eftir Carl Nielsen, Peter Tchaikovsky og Edward Elgar
3. Kórfestivalurin 2016
4. Musikkstevnan 2016
5. Havnakórið, konsert 15. mai
6. Útgávukonsert við Guðrið hansdóttir í NLH

## 18 fastar tónleikasendingar

Tónleikasendingarnar – í vikuligu skránni hjá útvarpinum – fevndu breitt um nógvar ymiskar sjangrur í 2016:

1. Chorus, - kórsangur og vokal tónleikur
2. Bolero - klassiskur tónleikur
3. Klassiskt Sunnukvøld
4. Kvørnin - ummælið av føroyskum tónleiki
5. Jazzofonin - jazztónleikur við skiftandi vertum
6. Norðurljóð - norðurlendskur (og føroyskur) tónleikur
7. Upp á gólv - føroysk kvæði
8. Ragnarrock - altjóða, norðurlendskur og føroyskur rocktónleikur.
9. Harmonikuløtan - útlendskur og føroyskur harmonikutónleikur
10. Gospeltónar - kristin tónleikur
11. Rót og rútma - útlendskur og føroyskur kontrytónleikur
12. Upp á tá - norðurlendskur og føroyskur dansebandstónleikur
13. Plátubarrin - beinleiðis leygarkvøldsending við "temaplátu" og lurtaraynskjum
14. Tit skriva vit spæla - sending við lurtaraynskjum
15. Døgurðabitin - blandaður tónleikur við skiftandi vertum
16. Temaplátan - skiftandi útgávur verða viðgjørdar í sendingini
17. Frí gear - blandaður poptónleikur
18. Kringrás - nýggjur tónleikur



Avrit frá kvf.fo

## Frí Gear

Í eini nýggjari tónleikasending í vetrarskránni 2016/17 varð sett í Frí Gear fríggjadagar beint eftir tíðindini á middegi og til kl. 14. Talan er um eina beinleiðis tónleikasending við nýggjum tónleiki kryddað við klassikarum farnu seksti árini, og har reyði tráðurin er lurtaravinarligt útvarp við einum løttum tóna, nú tað stundar til vikuskiftið. Endamálið við Frí Geari er eisini at varpa ljós á tónleik úr meiri forkunnugum londum og heimspørtum.

## Tónleikaráðið

Tónleikaráðið varð í 2016 mannað við Rúna Jákupsson, Elini Michelsen, Ragnari A Jacobsen, Una L. Hansen, Rólant Waag Dam og Eyðfinni Jensen. Á vikuligum fundum í Tónleikaráðnum verður nýggjur tónleikur umrøddur, áðrenn hann verður settur í umferð í útvarpinum.

## Stórur kvæðaupptøkudagur



Í 2016 skipaði Kringvarpið aftur fyri upptøkudegi við fleiri dansifeløgum. Talan var upptøkur til sjónvarp og tikið varð upp í Reinsarínum í Tórsgøtu. Tiltakið eydnaðist væl og tilsamans kvóðu feløgini 15 kvæði og vísur.
Bæði Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya hava tikið føroyskan dans kring landið, síðani tey vórðu stovnað. Hetta varð sjálvandi gjørt fyri at hava sendingar við føroyskum dansi, men í fyrstu árum útvarpsins varð eisini roynt at fáa ymisk frábrigdi í dansi- og kvøðingarlagi á band. Tí eru nógvar av gomlu upptøkunum bara nakrar minuttir.
Í 2014 avráddu Sláið Ring og Kringvarpið at skipa fyri einum størri dansitiltaki í Havn í januar í 2015. Tiltakið varð endurtikið í 2016 og er sett á skrá at verða í januar 2017.
Tiltøkini hava eydnast stak væl, og dansifeløg eru áhugað. Millum feløgini í 2016 vóru eisini Ung í Dansi, sum er nýtt felag í Sláið Ring.



Kringvarpið og Sláið Ring miða nú eftir at fáa upptøkur við kvæðum, sum Kringvarpið annaðhvørt ikki hevur ella hevur við upptøkum, har spurnartekin verður sett við goðskuna.
Til upptøkudagin í 2017 hevur Kringvarpið boðið dansifeløgunum í teimum bygdum ella landslutum, haðani Útvarpið hevur sínar fyrstu kvæðaupptøkur.
Upptøkudagurin verður liður í at varpa ljós á, at 6. februar 2017 eru 60 ár liðin síðani Útvarp Føroya varð sett á stovn. Tí er ein kvæðasending sett á skrá kvøldið fyri føðingardagin.
Tilsamans hevur Kringvarpið um 500 kvæðaupptøkur til útvarp.

# 11 flokkar og bólkar vitjaðu Kringvarpið

Skúlaflokkar og og ymiskir bólkar vitja hvørt ár Kringvarp Føroya. Serliga er talan um skúlaflokkar á bygd, sum eru á náms- ella kunningarferð í høvuðsstaðnum. Í 2016 vitjaðu 11 flokkar í Kringvarpinum. Harafturat vitjaðu bólkar við næmingum frá Fróðskaparsetrinum og miðnámsskúlum.

Ynski hjá næmingum er ofta at síggja, hvussu sjónvarp og útvarp verður gjørt, og hvussu stovnurin annars sær út. Fyri at báðir partar skulu fáa meira burturúr, hevur Kringvarpið í samráð við lærarar biðið næmingar hyggja at ávísum føroyskum sendingum í sjónvarpinum, ella lurta eftir sendingum í útvarpinum, t.d. ungdómssendingini Røddini. Í summum førum eru tey biðin um at koma við greiningum ella siga sína hugsan.

Á henda hátt hava næmingarnir verið noyddir at hyggja ella lurta og gera sær sínar tankar um tað, sum gjørt og sent verður í Kringvarpinum. Hetta hevur givið bæði næmingum og Kringvarpinum nakað.

Sjálvandi er tað eisini fragd hjá næmingunum at spyrja og tosa við journalistarnar, sum gera ymisku sendingarnar ella skriva tíðindi.

Harafturat fyrireikaði Kringvarpið á triðja sinni í 2016 ein námsdag fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum í lærugreinini miðlar. Lærari er Elin Hentze. Ein slíkan dag greiða journalistar frá arbeiði sínum – bæði um arbeiðshátt, útbúgvingar, innihald, avbjóðingar at gera djúptøknar sendingar o.s.fr. – og tey lesandi hava høvi at spyrja. Á henda hátt kann Kringvarpið og starvsfólkini lata nakað av síni vitan og royndir til tey lesandi. Tey lesandi vóru sera nøgd við námsdagin í 2016.

Í 2016 hevði Kringvarpið eina forvitnisliga vitjan, tá kirkjuráðslimir og fólk innan kirkjuna í Norðurjútlandi vitjaði Kringvarpið dagin fyri ólavsøkuaftan. Orðaskifti um átrúnaðarliga partin í Kringvarpinum var lívligur. Og tey undraðust á, hvussu nógv og hvussu fjølbroyttur átrúnaðarligi parturin í skránni hjá Kringvarpinum er. Føroyingurin, Lisbeth Michaelsen, prestur, samskipaði ferð og vitjan.


MENTAMÁLARÁÐIÐ

Kringvarp Føroya
Stílað: Dia Midjord, stjóra
Norðari Ringvegur 20
100 Tórshavn

Dagfesting: **16. august 2016**
Tygara ref.:
Máltal.: **16/00305-24**

**Takkarskriv**

Góði Dia,

Vísandi til eina sera áhugaverda vitjan í Kringvarpi Føroya saman við Illugi Gunnarsson, íslendska mentamálaráðharranum og fylgi, mánadagin tann 30. mai 2016, ynski eg at takka fyri góða kunning og blíðskap.

Við ynski um eitt framvegis gott samstarv.

Vinarliga

Mentamálaráðið

Rigmor Dam
*landsstýriskvinna*

*Íslendski ráðharrin í mentamálum, Illugi Gunnarsson, vitjaði Kringavarpið í saman Rigmor Dam, Landsstýriskvinnu í mentamálum, og umboðum fyri Mentamálaráðið tann 30. mai í 2016. Serligan áhugavert var orðaskifti á deildini Aktuelt um tíðindaflutning í einum lítlum samfelag, har øll kennast. Eisini var hann áhugaður í teimum stóru dokumentarsendingunum, Kringvarpið ger og hevur gjørt. Vitjanin eydnaðist væl og eftir vitjanina, fekk Kringvarpið takkarbræv frá Mentamálaráðnum.*

Avrit frá kvf.fo

# Málslig ráðgeving

*"Kringvarpið eigur at leggja dent á at hava gott føroyskt mál í sínum sendingum, og hevur skyldu at tryggja stravsfólkunum holla málsliga ráðgeving", verður sagt í lógini um Kringvarp Føroya.*

Eisini gamli public service-sáttmálin hevur eina áseting um málið:

*"Kringvarp Føroya skal hava ein virknan málpolitikk, ið skal virka fyri at menna føroyska málið. soleiðis at brúkarin upplivir rætt og lætt skilligt mál, ið er livandi í almenna rúminum. Aðalmálið er, at allar sendingar, ið Kringvarp Føroya framleiðir, eru á góðum føroyskum máli"* (úr Public service-sáttmálanum).
Í 2016 fór royndaravtalan við Sonna Smith, journalist, um málsliga rágeving, úr gildi. Kringvarpið gjørdi í 2016 avtalu við Føroyamálsdeildina á Fróðskaparsetrinum um samstarv um málsliga frálæru og vegleiðing. Henda avtalan er ikki sett í verk við árslok í 2016, men samstarvið verður væntandi tikið upp í 2017.

*Samskifti við borgaran:*

# Svara øllum klagum og viðmerkingum

Fyri at lúka skylduna í gamla public service-sáttmálanum um "samskifti við borgaran" kunnu fólk seta seg í samband við KvF á teldupostbústaðinum, netvarp@kvf.fo, ið verður upplýstur sum almennur teldupostur, har fráboðast kann og her viðmerkingar kunnu sendast.
Harumframt kunnu øll eisini seta seg í samband við Kringvarpið á almennu facebooksíðuni hjá stovninum. Tað merkir, at hyggjarar, lurtarar og lesarar hava høvi at klaga um tænastuna hjá Kringvarpinum ella koma við rósandi orðum.
Kringvarpið fekk í 2016 útivið 150 atfinningar, spurningar, uppskot, rósandi orð á netvarp@kvf.fo. Ofta er talan um viðmerkingar til tíðindi ella sendingar, og so spyrja fólk, hví onkur sending ikki er komin á heimasíðuna.

Avrit frá kvf.fo

### Miða eftir at svara

Tað, sum verður sent til netvarp@kvf.fo og á facebooksíðuni hjá KvF verður beint til tann rætta persónin ella ta røttu deildina. Er talan um veruligar klagur ella viðmerkingar, fáa tey, sum hava gjørt vart við seg, eitt svar. Er talan um tøkniligar spurningar o.l. verður slíkt rættað ella bøtt um skjótast gjørligt.

### Summi ringja

Tað hendir seg eisini, at fólk ringja, um tey hava eina viðmerking ella hava hug at finnast at onkrum. Flestu viðmerkingarnar eru um føroyska málið, brek við sendara ella stroyming, um skránna og tónleikavalið, sum teimum kanska ikki dáma. Talan var um færri enn 20 slíkar viðmerkingar í 2016.



## Umleið 100 facebook-boð




Á Facebook hava tey, sum brúka tænastur hjá Kringvarpinum, eisini høvi at gera vart við seg. Umleið 100 boð komu inn í 2016. Klagur koma sjálvdan umvegis síðuna. Er talan um eina beinleiðis klagu, vísir facebook-umsitarin á møguleikan at seta seg í samband við deildar-leiðarарnar ella stjóran fyri at vita, um málið ikki kann loysast í semju.
Í øðrum lagi verða folk kunnað um, at tey kunnu kæra til Fjølmiðlakærunevndina, kenna tey seg (ella onkur avvarðandi) órættvíst viðfarin í Kringvarpinum.

Viðmerkingarnar snúgva seg serliga um:

- Tøkni, ið ikki riggar
- Heimasíðu og sendinetini hjá útvarpinum og sjónvarpinum
- Tíðindaflutningin
- Innihaldið í sendingum, Kringvarpið hevur gjørt
- Hvar fólk finna tilfar á netinum, sum hevur verið sent í útvarpi ella sjónvarpi
- Hvussu fólk kunnu keypa sendingar
- Raðfestingar í sjónvarpsskránni
- Hví Kringvarpið ikki kann stroyma alt sjónvarpstilfarið beinleiðis til føroyingar uttanlands

Øll fólk, sum skriva persónlig boð við spurningum, fáa svar. Er tað “bara” viðmerkingar takkar umsitarin fyri, og sendir boðini víðari til røttu fólkini í húsinum. Hava fólk spurningar, verða tey beind til tey røttu fólkini í Kringvarp-inum. Eingin, ið skrivar, verður sleptur upp á fjall.
Svartíðin er vanliga nakrir fáir tímar, undantikið sunnudagar og frídagar.

Avrit frá kvf.fo

# Samskifti í sendingum við lurtarar

Á tíðindapallunum, útvarp og heimasíða, hevur kringvarpið rættiliga nógv samskifti við borgaran. Í sendingunum Vikuskiftið, Also, Surk og morgunsendingini GMF hava lurtarar høvi at senda inn sms ella á annan hátt gera vart við seg. Heilt nógvir lurtarar nýta hetta høvið. Sendingin Surk byggir í stóran mun á tað, sum lurtarar upplýsa um og takast við. Á heimasíðuni er “Rós og rís” møguleikin hjá hyggjarum og lurtarum at gera vart við seg.

# Heimasíðan verður dagførd

Seinasta árið er heimasíðan hjá Kringvarpinum ment innahýsis, og ætlanin er, at ein nýggj heimasíða skal síggja dagsins ljós í februar 2017, tá Kringvarpið fyllir 60 ár.
Alsamt fleiri lesa og lurta eftir tíðindum og sending á heimasíðum og portalum. Kvf.fo hevur nógvar vitjanir, men leiðslan hevur sett sær fyri at betra um heimasíðuna. Setningurin er, at tað skal vera lættari at brúka kvf.fo og tað skal ikki vera so torført at finna fram tilfar, sum liggur á kvf.fo
Kvf.fo, við undirsíðum, hevur í miðal 140.000 vitjandi mánaðarliga, og hesi vitja í miðal 3,4 síður hvørja ferð.

## Heimasíðan verður nógv vitjað

Alsamt fleiri brúka heimasíður fyri at lesa tíðindi, hyggja at innsløgum, sendingum ella lurta eftir sendingum. Í 2016 vórðu 18.171.505 síður vístar. Tað vil siga allar til samans; greinir, sendingar, andlát, netvarp og allar aðrar (undir)síður eisini.
Tey, sum kliktu seg beinleiðir inn á forsíðuna á kvf.fo íbrowsaranum, vóru 5.716.617. Onnur lyklatøl eru:

· 1.301.296 vitjandi í Netvarpinum, har útvarps- og sjónvarpssendingar eru,
· 998.783 ferðir kliktu brúkarar á Útvarp beinleiðis
· 709.832 ferðir kliktu brúkarar á Sjónvarp beinleiðis
· 591.193 ferðir kliktu brúkarar á Andlát
· 416.127 ferðir kliktu brúkarar á Sjónvarpsskránna
· 708.862 ferðir kliktu brúkarar á barnatilfar á Vit-síðunum



# Keypa sendingar og vanligar tænastur

Starvsfólkatalið í Kringvarpi Føroya lækkaði nógv frá 2006 til 2013 og fríyrkisfólk gera tí fleiri sendingar fyri kringvarpið.

Í 2016 samstarvaði Kringvarpið og Vinnuhúsið um sendirøðina Fisk & skips, sum Gutti Winther var vertur í.




Eisini keypti Kringvarpið sending hjá Eir í Ólavstovu um eplafestivalin á Sandi. Hon skal eisini gera eina sending – á Túri í Kringvarpinum – í sambandi við 60 ára dagin í 2017.

Á tónleikaøkinum hevur kringvarpið fastar avtalur við nakrar tónleikarar um at gera sendingar, eitt nú Bolero, Jazzofonina og Harmonikuløtuna. Og Peter Rouch gjørdi aftur í 2016 sendingina Rót og Rútma.

Harafturat veita privat vinnurekandi kringvarpinum tænastur. Talan er um telefon og vaktarhald, reingerð, matarskipan, grannskoðan og løgfrøði.

Deildin Aktuelt keypir ikki inn sendingar skipað, men deildin nýtir dagliga fríyrkisfólk í tíðindaflutninginum, bæði heima og uttanlands.

Avrit frá



# Partur í tilbúgvingini

Kringvarpið er partur í Tilbúgvingarskipan Landsins, sum hevur telefonnummur hjá lyklapersónum í kringvarpinum. Tað merkir, at kringvarpið kann eftir eini lítlari løtu vera við, um eitt ella annað álvarsamt hendir.



Avrit frá kvf.fo

# Førleikamenning og útbúgving

Kringvarp Føroya miðar støðugt eftir at geva starvsfólkum møguleikar at fara á skeið innan fyrisiting, tøkni, journalistik ella onnur redaksjonell viðurskifti.

Í 2016 luttóku 4 fólk í umsitingini á styttri førleikagevandi skeiðum innan bókhald, roknskap, talgilda innheinting og HR-løgfrøði.

Fólk frá deildunum Aktuelt og Tøkni vóru á einum fakfestivali í Danmark. Harafturat helt skeiðshaldari í søgufrásøgn skeið fyri fotografum og journalistum. Ein journalistur var eisini á einum skeiði í Reykjavík, Brüssel og í Keypmannahavn um Norðurlond og ES.

Ein journalistur kom í starvslæru í 2016 og í 2017 hevur Kringvarpið sett ein KT-lærling. Ein journalistur kemur aftur í starvslæru í 2017.






# SavnsGull bjargar savninum

SavnsGull varð skipað fyri nøkrum árum síðani sum ein ætlan at talgilda Kringvarpssavnið.

Í stóran mun er talan um eina bjargingrætlan. Lutvíst eru partar av bandasavninum so gamlir, at bondini eru nærum farin, og lutvíst eru maskinur at talgilda henda partin av savninum so fáar í tali, at spurningurin er bara um fá ár, til tær ikki eru tøkar meira.

Í 2016 varð drúgva arbeiðið at fyrireika ætlanina at talgilda sjónvarpsbondini komin undir land, og fyrstu sendingarnar eru farnar til Belgia at verða talgildar.

At talgilda útvarpsbond og tíðindaskjøl í Útvarpinum hevur gingið væl. Hetta arbeiðið verður gjørt í Kringvarpshúsunum í Sortudíki.

Meira fæst at vita um SavnsGull í serligari ársgrágreiðing.

Avrit frá kvf.fo

# Fýra deildir

Kringvarp Føroya hevur einfaldan bygnað. Bygnaðurin varð umskipaður fyrst í 2013 og talið á deildum lækkað í fýra deildir:

***Aktuelt – tíðindini og aktualitetssendingar***

***Mentan – sendingar, skrá og teksting***

***Tøkni – upptøkur til ljóð og film, sendiútgerð, studiosending, sendingaredigering, KT og ognir***

***Umsiting – fíggjarstýring, bókhald, lønir, samsýningar, spøl og savn***

*Public Service-frágreiðing fyri 2016*

*Ritstjóri: Jóhann Mortensen*

*Sett upp: Regin Davidsen*

# Rakstrarroknskapur 2016, Kringvarp Føroya

**KRINGVARP FØROYA**

| Nota | | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 62.880.940 | 57.914.291 |
| 2 | Framleiðandi deildir | -34.910.327 | -33.224.146 |
| 3 | Stuðlandi deildir | -20.700.714 | -18.945.521 |
| 4 | Annar kostnaður | -4.129.000 | -4.005.986 |
| | **Úrslit áðrenn rentur, avskrivingar og íløgur** | **3.140.899** | **1.738.638** |
| | | | |
| | Íløgur og størri viðlíkahald | -3.948.344 | -3.367.134 |
| | Avskrivingar og avsetingar av skuldarum | 812.248 | -695.779 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **4.803** | **-2.324.275** |
| | | | |
| | Aðrar fíggjarligar inntøkur | 0 | 6.442 |
| | Aðrir fíggarligir kostnaðir | -4.803 | -6.141 |
| | **Úrslit áðrenn støðling av avlopi** | **0** | **-2.323.974** |
| | | | |
| | Afturført støðlað avlop frá 2014 | 0 | 2.323.974 |
| | **Ársúrslit** | **0** | **0** |

Avrit frá kvf.fo

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2016, Kringvarp Føroya

**KRINGVARP FØROYA**

| Nota | OGN | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Grundøki | 3.183.768 | 3.183.768 |
| | Bygningur | 8.243.168 | 8.243.168 |
| | Tøkniligur útbúnaður | 7.980.047 | 8.826.636 |
| | Akfør | 27.143 | 131.236 |
| | **Materiel støðisogn til samans** | **19.434.126** | **20.384.808** |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 14.794.964 | 3.321.469 |
| 5 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 1.946.091 | 2.380.672 |
| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 3.781.094 | 3.262.178 |
| 7 | Onnur áogn | 912.822 | 693.988 |
| | **Áogn til samans** | **21.434.971** | **9.658.307** |
| 8 | Tøkur peningur | 584.994 | 919.131 |
| | **Ogn í umferð til samans** | **22.019.965** | **10.577.438** |
| | **Ogn til samans** | **41.454.091** | **30.962.246** |

| Nota | SKYLDUR | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Eginogn við ársbyrjan | -4.340.040 | -4.340.040 |
| | Mótkonta, bygningur | 8.243.168 | 8.243.168 |
| | Mótkonta, onnur materiel støðisogn | 11.190.958 | 12.141.640 |
| | Mótkonta, upphædd á StRk. 0360 | 4.340.040 | 4.340.040 |
| | Ársúrslit áðrenn støðling | 0 | -2.323.974 |
| | Flutt til/frá Strk. 0881 | 0 | 2.323.974 |
| | **Eginogn til samans** | **19.434.126** | **20.384.808** |
| | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Millumrokning við Gjaldstovuna | 0 | 0 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 0 | 0 |
| 9 | Onnur skuld | 4.382.280 | 4.424.195 |
| 10 | Fremmand fígging | 17.637.685 | 6.153.243 |
| | **Stuttfreistað skuld til samans** | **22.019.965** | **10.577.438** |
| | **Skyldur til samans** | **41.454.091** | **30.962.246** |

Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 11)

Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuni (nota 12)

Avrit frá kvf.fo

# Notur

| 1 | Inntøkur | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Kringvarpsgjald | 59.422.991 | 48.197.148 |
| | Útvarpskunngerðir (í 2015 eru útvarpslýsingar við) | 2.712.853 | 4.840.400 |
| | Ískoytisveitingar (í 2015 eru sjónvarpslýsingar við) | 466.204 | 1.459.398 |
| | V4-spælið, netto | -29.690 | 202.518 |
| | Gekkaspælið, netto | 150.114 | 2.954.734 |
| | Aðrar inntøkur | 158.468 | 260.093 |
| | **Inntøkur til samans** | **62.880.940** | **57.914.291** |

| **V4-spælið, netto** | **2016** | **2015** |
|---|---|---|
| Inntøkur | 381.612 | 527.325 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -176.380 | -175.954 |
| Aðrar útreiðslur | -234.922 | -148.853 |
| **V4-spælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **-29.690** | **202.518** |

| **Gekkaspælið, netto** | **2016** | **2015** |
|---|---|---|
| Inntøkur | 20.623.199 | 10.525.440 |
| Lønir, samsýningar og lønartengdar útreiðslur | -451.113 | -446.735 |
| Aðrar útreiðslur | -8.537.530 | -5.690.857 |
| **Nettoúrslit í árinum** | **11.634.556** | **4.387.848** |
| Partur av inntøku í árinum, sum er støðlað á kontu fyri fremmandari fígging | -11.484.442 | -1.433.114 |
| **Gekkaspælið, tikið við sum rakstrarinntøka í árinum** | **150.114** | **2.954.734** |

Avrit frá kvf.fo

# Notur

| 2 | Framleiðandi deildir | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | **Aktuelt/Tíðindadeildin:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 10.978.676 | 10.306.175 |
| | Vørur og tænastur | 393.430 | 706.285 |
| | **Aktuelt/Tíðindadeildin til samans** | 11.372.106 | 11.012.460 |
| | | | |
| | **Heimasíða:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 683.812 | 991.044 |
| | Vørur og tænastur | 107.360 | 32.700 |
| | **Heimasíða til samans** | 791.172 | 1.023.744 |
| | | | |
| | **Mentan/Programmdeildin:** | | |
| | Lønir og samsýningar | 10.265.693 | 10.108.101 |
| | Vørur og tænastur | 2.127.640 | 1.570.797 |
| | **Mentan/Programmdeildin til samans** | 12.393.333 | 11.678.898 |
| | | | |
| | **Tøknideildin (framleiðsluparturin):** | | |
| | Lønir og samsýningar | 9.909.241 | 8.947.592 |
| | Vørur og tænastur | 444.475 | 561.452 |
| | **Tøknideildin (framleiðslupartur) til samans** | 10.353.716 | 9.509.044 |
| | | | |
| | **Framleiðandi deildir til samans** | **34.910.327** | **33.224.146** |

Avrit frá kvf.fo

# Notur

| 3 | Stuðlandi deildir | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | **Umsitingin:** | | |
| | Lønir | 4.888.185 | 4.797.981 |
| | Vørur og tænastur | 3.153.989 | 2.558.873 |
| | Umsitingin til samans | 8.042.174 | 7.356.854 |
| | | | |
| | **Tøkni deildin (ikki framleiðslupartur):** | | |
| | Lønir og samsýningar | 4.682.237 | 4.715.848 |
| | Vørur og tænastur | 3.466.402 | 2.791.526 |
| | Samskiftiskostnaður | 998.655 | 1.042.237 |
| | Húsakostnaður | 3.002.439 | 2.612.668 |
| | Rakstur av akførum | 508.807 | 426.388 |
| | Tøkni deildin til samans | 12.658.540 | 11.588.667 |
| | | | |
| | **Stuðlandi deildir til samans** | **20.700.714** | **18.945.521** |

| 4 | Annar kostnaður | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Kostnaður fyri rættindi | 4.129.000 | 4.005.986 |
| | **Annar kostnaður til samans** | **4.129.000** | **4.005.986** |

| 5 | Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 2.170.354 | 3.083.914 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -224.263 | -703.242 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kunngerðir og lýsingar til samans** | **1.946.091** | **2.380.672** |

Avrit frá kvf.fo

# Notur

| 6 | Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Áogn, brutto | 7.813.094 | 8.262.178 |
| | Avsett móti væntaðum tapi | -4.032.000 | -5.000.000 |
| | **Vøru- og tænastuáogn, kringvarpsgjald til samans** | **3.781.094** | **3.262.178** |

| 7 | Onnur áogn | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 488.189 | 0 |
| | Depositum | 76.082 | 76.082 |
| | Lønarendurgjøld | 134.437 | 0 |
| | Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 214.114 | 617.906 |
| | **Onnur áogn til samans** | **912.822** | **693.988** |

| 8 | Tøkur peningur | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | BankNordik | 322.448 | 442.087 |
| | Eik Banki | 119.734 | 270.269 |
| | Norðoya Sparikassi | 54.891 | 18.553 |
| | Suðuroyar Sparikassi | 85.921 | 186.177 |
| | Kassapeningur | 2.000 | 2.045 |
| | **Tøkur peningur til samans** | **584.994** | **919.131** |

| 9 | Onnur skuld | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| | Meirvirðisgjald | 0 | 173.025 |
| | Skyldugar lønir | 229.637 | 0 |
| | Skyldug avspáking | 1.118.300 | 989.600 |
| | Skyldugt frítíðarískoyti | 327.000 | 331.000 |
| | Skyldur í sambandi við eydnuspøl | 1.683.117 | 1.943.739 |
| | Upphavsrættargrunnur | 131.226 | 109.742 |
| | Tíðaravmarkingar | 893.000 | 877.089 |
| | **Onnur skuld til samans** | **4.382.280** | **4.424.195** |

Avrit frá kvf.fo

# Notur

| 10 Fremmand fígging | | 2016 | 2015 |
|---|---|---|---|
| Støðlað við ársbyrjan | | 6.153.243 | 7.044.103 |
| Tilgongd í árinum | | 11.604.866 | 4.590.366 |
| Frágongd í árinum | | -120.424 | -5.481.226 |
| **Støðlað/fremmand fígging tilsamans** | | **17.637.685** | **6.153.243** |
| | | | |
| **Tilgongd í árinum** | | | |
| Inntøkur V4-spælið, netto | | -29.690 | 202.518 |
| Inntøkur gekka-spælið, netto | | 11.634.556 | 4.387.848 |
| **Tilgongd tilsamans** | | **11.604.866** | **4.590.366** |
| | | | |
| **Frágongd í árinum** | | | |
| Flutt til rakstur, restfígging | | 120.424 | 3.157.252 |
| | | | |
| **Brúkt av avlopi frá 2014:** | | | |
| Aktuelt og kjak | 0 | | |
| Børn og ung | 0 | | |
| Undirhald | 0 | | |
| Útgerð, tøkni og heimasíða | 0 | | |
| Onnur endamál | 0 | 0 | 2.323.974 |
| | | | |
| **Frágongd tilsamans** | | **120.424** | **5.481.226** |

| Sundurgreinaðar saldur | Eydnuspøl 2014 | Eydnuspøl seinni ár | Saldur tilsamans |
|---|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan 2016 | 4.720.129 | 1.433.114 | 6.153.243 |
| Tilgongd í 2016 | 0 | 11.604.866 | 11.604.866 |
| Frágongd í 2016 | 0 | -120.424 | -120.424 |
| **Salda við ársenda 2016** | **4.720.129** | **12.917.556** | **17.637.685** |

Inntøkur frá eydnuspølum vórðu á fyrsta sinni støðlaðar sum fremmand fígging í fíggjarárinum 2014. Í roknskapinum fyri 2014 varð støðlaða upphæddin tikin við sum inntøka í rakstrinum, og flutt á kontuna fyri fremmanda fígging í fíggjarstøðuni sum eitt avlop. Frá og við 2015 verða inntøkur frá eydnuspølum bert inntøkuførdar í rakstrinum í tann mun, tørvur er á tí, sum restfígging. Upphæddin viðvíkjandi 2014, sum longu er inntøkuførd eina ferð, verður afturførd so hvørt, sum brúkt verður av henni, og hon verður skrásett í rakstrinum sum ein sjálvstøðugur postur áðrenn ársúrslitið.

Avrit frá kvf.fo

# Notur

## 11 Ognir, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Bygningur, tøkniligur útbúnaður og akfør, ið hava virðið omanfyri 75 tkr., eru skrásett sum materiell støðisogn í fíggjarstøðuni. Av hesum eru 3,0 mió.kr. bert við í fíggjarstøðuni í ársroknskapinum, men ikki í fíggjarstøðuni í Búskaparskipan Landsins (2015: 3,8 mió.kr). Hetta verður rættað í 2017, soleiðis at samsvar verður millum skrásetingar í ársroknskapi og Búskaparskipan Landsins.

## 12 Skyldur, ið ikki eru tiknar við í fíggjarstøðuna

Skyldug restferia frá innvinningarárinum 2015/2016 er við árslok 2016 gjørd upp til 1,0 mió.kr. (2014/2015: 0,8 mió.kr.).

Harumframt hava starvsfólk í roknskaparárinum 2016 vunnið rætt til feriu at halda í frítíðarárinum 2017/2018. Av hesari skyldu eru 0,3 mió.kr. tiknar við í fíggjarstøðuna, svarandi til skyldugt frítíðarískoyti, ið er innvunnið í tíðarskeiðinum 1. apríl – 31. desember 2016.

Avrit frá kvf.fo

Avrit frá kvf.fo

Avrit frá kvf.fo

Avrit frá kvf.fo

KRINGVARP FØROYA